# – Okkara skylda at tæna Føroyum



Føroysku bogaskjúttarnir fingu sera góð úrslit á Oyggjaleikunum seinast, og teir ætla eisini at vinna heiðursmerki hesaferð

**Hóast føroysku bogaskjúttarnir í fleiri ár hava verið einaráðandi á Oyggjaleikunum, heldur Schandorff Vang ikki, at liðið skal taka seg av leikunum. Tað er teirra skylda at tæna Føroyum, heldur formaðurin í Skjótisambandi Føroya, sum eisini er oyggjaleikaluttakari**

**BOGASKJÓTING**

*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Føroysku bogaskjúttarnir hava tað frálíku siðvenju at tryggja føroyska ferðaliðnum fleiri heiðursmerki hvørt einasta ár. Soleiðis verður eftir øllum at døma aftur í ár, nú eitt lið møguliga sterkari enn nakrantíð verður sent avstað

## Fleiri góð kort

Føroysku bogaskjúttarnir hava aftur í ár nógv gott fólk at taka av. Umframt teir vanligu sterku luttakararnar, er ein garvaður harri vendur aftur á landsliðið. Talan er um Jógvan Niclasen, sum hevur hildið steðg í eina tíð, og ikki var við á seinastu leikunum.

– Jógvan er bara 27 ára gamal, og hevur við sínum nærlagni undir venjing ikki tikið seg nakað aftur eftir langa steðgin, sigur Schandorff Vang, sum eisini stillar upp á leikunum.

Báðir stilla teir upp í compound, og eru teir báðir eitt gott boð uppá gullmerkjavinnaran.

Í recourve sær eisini sera gott út. Hans Petur Nygaard, sum seinastu tíðina hevur verið til skips, er somuleiðis vendur aftur á landsliðið, og er saman við Absalon Hansen við til gera føroyska liðið eisini galdandi í oddinum har.

Hjá kvinnusíðuni sær somuleiðis bjart út, har tær báðar móður og dóttir, Sigrid og Annika Vang, eisini lættliga kunnu gera um seg.

## Fara altíð at stilla upp

Bogaskjúttarnir ætla sær ikki at ganga í fótasporunum hjá fótbóltskvinnunum, sum vegna vantandi mótstøðu trektu seg aftur av leikunum. Gaman í fáa bogaskjúttarnir ikki nógv mótstøðu, men hetta skal ikki vera við til at trekkja seg aftur.

– Sjálvandi fara vit altíð at vera við. Okkara høvuðsuppgáva er at hava so sterkt lið sum tilber, og at tæna landi okkara, sigur Schandorff.

Í fjør hevði føroysku skjúttarnir sítt besta úrslit nakrantíð. Heili 9 heiðursmerki vórðu vunnin, har av seks gull. Málið í ár er at halda støðið, og sambært Schandorff er hetta væl møguligt.

– Jógvan Niclasen er ikki dragnaður nakað, meðan hinir skjúttarnir helst hava tikið seg fram, sigur hann meðan hann peikar okkum á, at Hans Petur Nygaard hevur staðið seg sera væl undir venjingunum.

## Saknar karmarnar

Eins og í nógvum øðrum ítróttargreinum saknar Schandorff frægari umstøður. Føroyska veðurlagið noyðir skjúttarnir undir tak at skjóta, og tað er her, ið trupulleikin stingur seg upp. Skjúttarnir í Havn fáa høli frá Tórshavnar Skipasmiðju, meðan teir í Runavík og vesturi í Vágunum hava ítróttarhallirnar. Ítróttarhøllin í Vágunum er ikki nóg long til endamálið, soleiðis at skjúttarnir ikki fáa vant undir røttum umstøðum.

Annars heldur Scandorff, at bogaskjótingini eisini tørvar ungdómin.
– Altíð er tørvur á ungdómi, og vit arbeiða eisini við hesum. Vit hava fleiri ferðir verið runt á skúlum og lagt teimum yngri lag á, sigur Scandorff, og vísur á, at tørvur somuleiðis er á fleiri feløgunum.

